Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinna

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Bygdaleiðir og túrar gjøgnum Eysturoyartunnilin

Spurningar:

1. Nær kunnu fólk í Norðoyggjum og Eysturoy vænta, at fleiri túrar til Havnar verða koyrdir gjøgnum Eysturoyartunnilin ?
2. Er nøkur loysn funnin á kostnaðinum fyri bussar hjá SSL at koyra gjøgnum Eysturoyartunnilin? Um nei, nær kann væntast ein loysn?
3. Hvussu langt er arbeiðið komið við at verkseta nýggju planleggingarskipanina?

Viðmerkingar:

Norðoyingar og eysturoyingar, ið dagliga nýta bussleiðina hjá SSL til og frá arbeiði, hava í fleiri ár sóknast eftir, at fleiri túrar verða koyrdir gjøgnum tunnilin. Enn í dag eru fleiri túrar eftir Skálafjarðarleiðini og uttan um tunnilin til Havnar.
Strandferðslan hevur ført fram, at fleiri forðingar eru, ið mugu loysast, áðrenn nakað hendir.
Í svari til undirritaðu tann 14. apríl 2025 førdi SSL fram : *"Tað verður arbeitt við at tillaga leið 401, og nakrar broytingar verða eftir ætlan gjørdar á rutuni millum Norðoyggjar og Suðurstreymoy, tá ið skúlarnir byrja aftur eftir summarfrítíðina."*(52-096/2024)
Nú eru vit í september mánaði, og enn er ferðaætlanin fyri leið 401 óbroytt. Sama er við leið 400.

Tað hevur eisini verið ført fram, at ein avbjóðing er, at Bygdaleiðir mugu gjalda fult gjald fyri hvønn buss, ið koyrir gjøgnum Eysturoyartunnilin. Í apríl 2025 varð upplýst, at samskifti var við tunnilsfelagið um henda trupulleikan. Tí er tað áhugavert at frætta, um nøkur loysn er í eygsjón viðvíkjandi gjaldskipanini.

Ein onnur fyritreyt fyri at gera størri broytingar hjá Bygdaleiðum er, sambært Strandferðsluni, at Strandferðslan fær sett nýggja planleggingarskipan í verk. Upplýst er áður, at hetta arbeiðið verður tikið uppaftur eftir páskafrítíðina, og tá ið skipanin er sett í gildi, verður tað munandi lættari at tillaga og broyta verandi ferðaætlanir. Í svari til §52 spurning 52-005/2025 upplýsir landsstýrismaðurin: *at ein nýggj planleggingarskipan er í ferð við at verða tikin í nýtslu"*.

Samanumtikið eru tað ábendingar um, at fleiri forðingar fyri at broyta ferðaætlan á leið 401 og leið 400, so brúkarin fær eina betri tænastu, eru beindar burtur. Fyri at fáa upplýst nær hesar broytingar verða settar í gildi verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 10. september 2025

Eyðgunn Samuelsen